# Gud uttan fyri politikk



Mikudagin var Kristine Stricker Hestbech, nýggjur prestur í Havn, gestur á Rás 2. Í sendingini varð millum annað tosað um átrúnað í gerandisdegnum, og lurtarar sendu eisini spurningar til prestin. Ein av spurningunum frá lurtarunum var, hvat prestur heldur um, at átrúnaður og politikkur onkuntíð verða blandað saman í løgtingsarbeiðnum. Danski presturin hevði eina avgjørda hugsan um hetta. - Átrúnaður og politikkur skulu ikki blandast saman. Tað er einki galið við at hava trúgvandi politikarar í løgtinginum, men tað er skeivt at spenna Gud fyri tann politiska vognin, segði Kristine Stricker Hestbech við Rás 2.

# Jan aftur í luftina eftir 30 ár

Hósdagin var Jan Müller, ábyrgdarstjóri á Sosialinum, aftur vertur í útvarpssending. Fyri 30 árum síðani var hann í praktikk í Útvarpinum, sum tá sendi frá Bryggjubakk í Havn, og síðani hevur hann bara verið sum gestur í útvarpi. Hósdagin sendi Jan tveir tímar beinleiðis útvarp úr Pegasus í Klaksvík, og millum gestirnar í sendingini vóru Signar á Brúnni, Karl Martin Samuelsen og Finnur Sivertsen. Fríggjamorgunin varð Jan vertur í sending, sum var send úr Miðlahúsinum í Vágsbotni, og tað er í sama grannalagi sum Bryggjubakki.

# rinum frá bróstkrabba



*- Krabbameinsfelagið og kvinnurnar í Bót til Bata hava verið ótrúliga góðar, men eg sakni, at krabbameinssjúklingar fáa meira kunning. Kanska áttu kommunulæknar at verið betri skúlaðir í krabbameinstrupulleikum, tí tað eru teir, sum skulu lofta øllum sjúklingunum, tá viðgerðin er liðug, heldur Marjun Larsen úr Fuglafirði*

*Mynd: Høgni Thomsen*

tað, og eg orkaði ikki at snakka um sjúkuna.

Men hóast henni ikki dámdi, tá fólk beinleiðis spurdu um sjúkuna, so gleddi tað hana, tá fólk komu og søgdu, at tey hugsaðu um hana ella bóðu fyri henni.

- Tað føldist virkuliga gott, tá fólk vístu, at tey høvdu umsorgan, men tað kendist sjálvandi líka sárt, tá tey fluttu seg av vegnum, tí tey ikki høvdu mót at møta mær, sigur Marjun erliga.

Krabbameinsfelagið og sjálvhjálparbólkurin Bót til Bata hava havt serligan týdning, tí har hevur Marjun kunnað tosað við kvinnur, sum veruliga skilja, hvat hon hevur verið ígjøgnum.

- Jansy Gaardlykke frá krabbameinsfelagnum kom til mín, tá eg lá á hvíldarheiminum eftir skurðviðgerð. Hon var sera góð í ráðum og gav mær eisini ein persón úr Bót til Bata at tosa við, og henda kvinnan hevur hjálpt mær ótrúliga nógv, greiðir Marjun frá.

### Betri kunning

Kemo- og stráluviðgerðirnar gingu væl, og Marjun letur væl at onkulogisku deild á Landssjúkrahúsinum og krabbameinsdeildini í Álborg, har hon var í viðgerð. Men hon kennir eitt sindur, at hon var slept upp á fjáll, tá viðgerðin var liðug.

- Krabbameinsfelagið og kvinnurnar í Bót til Bata hava verið ótrúliga góðar, men eg sakni, at krabbameinssjúklingar fáa meira kunning. Eg hevði viljað, at onkur hevði sagt mær, at tú tekur hetta medisini, og tí fært tú hesi hjáárinini, sigur Marjun.

Í staðin hevur hon ofta upplivað læknavitjanir sum hugnalig prát, sum ikki hava givið henni tað, sum henni tørvar.

- Kanska áttu kommunulæknar at verið betri skúlaðir í krabbameinstrupuleikum, tí tað eru teir, sum skulu lofta øllum sjúklingunum, tá viðgerðin er liðug, staðfestir Marjun. Hon greiðir frá, at hon kendi seg í tryggum hondum á Landssjúkrahúsinum, men tá viðgerðin var við at vera liðug, merkti hon, at tey royndu at inndraga kommunulæknan.

- Tá eg skuldi hava sjúkraváttan, bóðu tey meg fara til kommunulæknan, og eg fekk tað fatan, at nú var tað kommunulæknin, sum eg skuldi venda meg til.

Hon hevur havt stórar trupulleikar við pínu í liðunum, serliga í arminum. Men hon fekk onga ávísing til fysioterapeut. Á einum fundi hjá Bót til Bata fekk hon tilvildarliga at vita, at hon kundi ringja beinleiðis til onkologisku deild og fáa ávísing. Hetta gjørdi hon, og so slapp hon endiliga til fysioterapeut.

- Eg havi eisini havt trupulleikar við hondini og tumlinum og havi fingið skurðviðgerð. Men ikki fyrr enn eg var til hálvárligu kanningina í mei í ár, fekk eg at vita, at hetta hevði beinleiðis samband við tað medisin eg taki.



*- Tað føldist virkuliga gott, tá fólk vístu, at tey høvdu umsorgan, men tað kendist sjálvandi líka sárt, tá tey fluttu seg av vegnum, tí tey ikki høvdu mót at møta mær, sigur Marjun Larsen*

*Mynd: Høgni Thomsen*

### Óarbeiðsfør

Umframt pínuna í liðunum hevur Marjun eisini manglað styrki og orku. Hóast hon ikki longur er sjúk, er hon heldur ikki nóg frísk til at arbeiða.

- Læknin heldur, at eg burdi orkað at arbeitt, men eg sleppi ikki burtur úr møðini. Og tað merkir sjálvandi dagligdagin, sigur hon álvarsom.

> *Læknin heldur, at eg burdi orkað at arbeitt, men eg sleppi ikki burtur úr møðini. Og tað ávirkar sjálvandi gerðandisdagin*

Stutt fyri at hon gjørdist sjúk, hevði hon fingið nýtt starv í einum barnagarði. Og tey vóru sera beinasom, tá hon gjørdist sjúk, greiðir Marjun frá. Tey longdu hennara starv í eitt hálvt ár, hóast hon ikki var til arbeiðis.

- Eisini tá eg fekk eitt vart starv á eldrasambýlinum, merkti eg vælvild bæði frá stovninum og teimum á almannastovuni. Men eg havi virkuliga ikki orku at arbeiða, sigur Marjun tungliga.

Tað endaði við, at hon segði varda starvið frá sær fyri nøkrum mánaðum síðani.

- Tað er tungt ikki at orka nakað, og tað hevur eisini verið hart at venja seg við, at eg ikki longur klári meg sjálva. Eg fái lægstu fyritíðarpensión á 4.600 krónur, men tað røkkur sjálvandi ikki langt.

Familjan og netverkið hava stóran týdning fyri Marjuna. Hon sigur, at hon als ikki hevði verið før fyri at komið ígjøgnum sjúkuna uttan tann stuðul, sum hon fekk frá manninum.

- Hann er farin ígjøgnum alt saman við mær, og tað hevur hjálpt mær ótrúliga væl. Og kenslan av, at eg havi eina familju og vinir, sum standa aftanfyri meg, gevur mær eisini styrki, sigur Marjun avgjørd og hyggur út gjøgnum vindeygað.